og egoismu er tann, at egoisman er húkl og ótti.

Vit skulu fjálga um Føroya land. Vit skulu virða natúruna. At virða natúruna er at fjálga um hana, varðveita hana við tí tilfeingi, ið eftir er. Annars verður endin ein natúrvanlukka, og so bjóðast ikki bót. Nørast skal um lívsvirðið, eitt annað lívsvirði. Virðast skal alt, sum flýgur, svimur og hevur bein at ganga á.

Føroyingurin hevur altíð verið flytifuglur. Hann kemur og fer, honum hevur altíð longst heim aftur. Men tíverri hevur hann nú reist byrging fyri sínum unga fólki. Tann floygdi ungdómurin hevur altíð verið á ferð víða um lond, at nema sær kunnleika og vitan um onnur fólk. Ungdómurin veit so mikið, at tað ber ikki longur til at dylja, at Føroya land nú – ongantíð ov skjótt – aftur fer at fjálga um sítt unga fólk, so at tað kann liva sum flytifuglur, til tað búsetist og byggir her á landi.

Føroya land er Føroya fólk. Skal Føroya fólk verða ført fyri at fjálga um sín ungdóm, so at hann kennir fløva í sínum reiðri heima, má aftur fjálgast um alt fólkið. Tað er tað vert. Tí fólkið er hóast alt landsins dýrabarasta tilfeingi.

Fuglar flestir gerast nú vísir,
vilja ei lata seg fanga,
sum teir síggja tjaldrið gera,
teir flestu eftir ganga.



Tí verður tú tjaldur altíð
væl komið til okkum heim.

Á grækarismessu 1994
Sonne Smith

BRAKANDI BÍLIGT!

PROFESSIONELLUR EL-HÁRKLIPPARI

Professionell heimaklipping av allari familjuni.
Knívurin úr rustfríum stáli hevur stigleysa og fasta innstilling av klippilongdum.
Verður latin við í praktiskari tasku við hárklippara, 4 trimmarum, frisørsaksi, kambi, frisørslagi, rensibust og smyrjiolju.
Nágreinilig leiðbeining og ókeypis VHS-videobond fylgja við.
Eisini sera vælegnaður sum skeggtrimmari.



TILBOÐ 790.-

DISCOUNT

marstein

Áarvegur - tlf. 11305

Dani skuldsettur fyri at hava tikið føroysku konu sína av døgum

Ein 46 ára gamal dani er niðri skuldsettur fyri síðsta fríggjadag at hava dripið 44 ára gomlu konu sína, ið er føroysk – ættað úr Suðuroynni. Maðurin skal hava sagt, at talan var um eitt óhapp og at konan var gliðin á gólvinum í baðirúminum og hevði sligið høvdið í, men kanningarnar hava vist, at konan varð kvald. Málið kemur fyri rættin í Frederikssund fyrrapartin í dag

Hendingin fór fram síðsta fríggjakvøld – fyri hálvariaðru viku síðani – í heiminum í Skibby á Suðursælandi, har 44 ára gamla føroyska konan, ið er ættað úr Suðuroynni, búði saman við 46 ára gamla manni sínum, ið er dani.

Tað var um morgunin, at maðurin sjálvur ringdi eftir Falck fyri at fáa ein sjúkrabil, tí »eitt óhapp var hent, tá konan var gliðin á gólvinum á baðirúminum og hevði sligið høvdið í«, sum donsk bløð hava skrivað um hendingina.

Tá sjúkrabilurin kom á staðið, var kvinnan lívleys og bløddi frá einum stórum sári aftanfyri á høvdinum.

Læknarnir á sjúkrahúsinum kundu staðfesta, at 44 ára gamla kvinnan umframt skaðan í høvdið eisini hevði reyð merki á hálsinum, ið kundu bent á, at hon var kvald. Hetta varð eisini staðfest á Retsmedicinsk Institut í Keypmannahavn.

Seinnapartin fríggjadagin varð 46 ára gamli maðurin handtikin og til grundlógaravhoyring í rættinum í Frederikssund, »sigtet for drab«, sum skuldsetingin frá politinum ljóðar.

Rættarfundurin vardi í næstan tríggjar tímar, og endin varð, at maðurin varð varðhaldsfongslaður í eina viku. At fongslingin í einari so álvarsligari skuldseting sum drápi, bert er í eina viku, kann benda á, at dómarin ikki heldur grundarlagið undir skuldsetingini hjá politinum móti manninum vera serliga gott.

Fyrrapartin í dag verður aftur rættarfundur í málinum, og eftir at hava verið í sambandi við politiið í Frederikssund skilir Tíðindablaðið Sosialurin, at politiið fer at biðja um at fáa fongslingina longda.

– Vit hava arbeitt nógv við málinum, meðan maðurin hevur sitið varðhaldsfongslaður, men eg kann einki siga, tí alt gongur fyri seg á afturlatnum fundum, sigur kriminalpolitisturin, ið hevur leiðsluna av kanningararbeiðinum hjá politinum í Frederikssund.

Rættarfundurin, ið er fyri afturlatnum hurðum, verður í dag kl. 8.40 føroyska tíð.

hj.



Sinnisbati

Fritíðarhølið í Krossgøtu 15 er opið mánakvøld kl. 19–22.